# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.01.2018*

**<u>Bygdaráðsfundur: 29.01.2018 kl. 18.00 til kl. 18.30</u>**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 1/2018 Ársroknskapur 2016 – Kongshavnar Havn</u>**

<u>J.nr. 08.14.00-Ø09-1-18</u>

**Málslýsing**

Ársroknskapurin fyri 2016 hjá Kongshavnar havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**

Á fundi 24.01.2018 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2016, hjá Kongshavnar Havn soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 2/2018 Umsókn um stuðul – Tofta Talvfelag</u>**

<u>J.nr. 18.20.00-G01-1-17</u>

**Málslýsing**

Í skrivi 07.01.2018 søkir Tofta Talvfelag um fíggjarligan stuðul fyri 2018.

**Tilmælir**

Á fundi 17.01.2018 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta Talvfelag kr. 12.000 í stuðli fyri 2018.

Á fundi 18.01.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin er avsettur á fíggjarætlanini 2018.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.01.2018*

**Mál nr. 3/2018 Umsókn um stuðul – Fornminnisfelagið**

J.nr. 00.32.10-S08-9-17

**Málslýsing**

Í skrivi 04.12.2017 søkir Fornminnisfelagið, vegna Bygdasavnið í Nes kommunu, um fíggjarligan stuðul fyri 2018.

**Tilmælir**

Á fundi 17.01.2018 mælir Mentanarnevndin til at játta Fornminnisfelagnum í Nes kommunu kr. 100.000 í stuðli fyri 2018.

Á fundi 18.01.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin er avsettur á fíggjarætlanini 2018.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 4/2018 Umsókn um stuðul – Tofta Ítróttarfelag**

J.nr. 00.32.10-S08-9-17

**Málslýsing**

Í skrivi 10.01.2018 søkir Tofta Ítróttarfelag um fíggjarliga stuðul fyri 2018.

**Tilmælir**

Á fundi 17.01.2018 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta Ítróttarfelag kr. 200.000 til vaksnamannadeildina, og kr. 150.000 til ungdómsdeildina.

Á fundi 18.01.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin er avsettur á fíggjarætlanini 2018.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 5/2018 Alment vesi á havnalagnum**

J.nr. 08.03.25-P20-1-17

**Málslýsing**

Bygdaráðið hevur arbeitt við ætlanum um at gera alment vesi í Nes kommunu.

Teknistovan Gøta hevur gjørt uppskot um alment vesi á havnalagnum, í gamla vatnhúsinum hjá flakavirkinum, norðanfyri egningaskúrðarnar. Mettur kostnaður er kr. 401.000.

**Tilmælir**

Á fundi 16.01.2018 mælir Teknisku nevnd til, at alment vesi verður gjørt, eftir uppskotið frá Teknistovuni Gøta.

Á fundi 24.01.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Fíggjarnevndin staðfesti, at kr. 250.000 ið vóru avsettar á fíggjarætlanini fyri 2017 ikki blivu brúktar. Peningurin er ikki avsettur á fíggjarætlanini fyri 2018.

Fíggjarnevndin mælir til, at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Málslýsing**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 6/2018 Umsókn um byggiloyvi**
J.nr. 02.34.02-P20-12-17
**Málslýsing**
Í skrivi 21.11.2017 søkir Janus Trúgvason vegna Sp/f Jákup Hansen, um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699y á Gaddavegnum.

Tekniska deild mælir til, at byggiloyvi verður givið samb. innsendu tekningum.

**Tilmæli**
Á fundi 16.01.2018 staðfesti Tekniska nevnd, at tekniska deild hevur givið loyvi til at arbeiðið uppá sethúsini kann byrja. Tekniska nevnd játtar byggiloyvið til sethúsini eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 7/2018 Keyp av bingjum**
J.nr. 07.00.00-G01-1-18
**Málslýsing**
Kommunan hevur arbeitt við at útvega sær eina pressubingju til endurnýtsluvirkið, og eina nýggja bingju á Tofta havn. Kostnaðurn fyri pressubingjuna er kr. 172.900 + fraktkostnað DK/FO, uml. kr. 12.000, og kostnaðurin fyri minnu bingjuna er 14.000 kr. íroknað frakt.

**Tilmælir**
Á fundi 16.01.2018 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan keypur pressubingjuna til endurnýtsluvirkið, og eina nýggja bingju til burturkast á Tofta kaj.

Á fundi 24.01.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælini frá Teknisku nevnd,.Peningurin fyri pressubingjuna verður tikin av stovninum endurnýtslan íløgur, og peningurin fyri bingjuna til havnalagið verður tikin av stovninum havnin rakstur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 9/2018 Broyting í kortinum sum hoyrir til byggisamtyktina**
J.nr. 02.04.03-G01-1-18
**Málslýsing**
Í sambandi við, at Nes kommuna hevur søkt Umhvørvisstovuna um góðkenning av leingjan av grótkastinum, hevur Umhvørvisstovan gjørt vart við, at tað ikki sæst á kortinum, sum hoyrir til byggisamtyktina, at økið, undir ætlaðu leingingini, er lagt út sum D-øki.

Verandi D-øki er víst at fevna um verandi grótkast við meira; men tað framgongur ikki av kortinum, at øki er lagt av í framhaldi av verandi grótkasti til umrøddu leingingina.

Til tess at sleppa undan ivamáli, hvørt pláss er fyri ætlaðu leingingini, verður mælt til at vísa eitt øki áleið 30 x 120 m á kortinum, sum hoyrir til byggisamtyktina

**Tilmæli**
Á fundi 29.01.2018 mælir Tekniska nevnd til at kortið, til byggisamtyktina verður broytt soleiðis, at leingjanin av grótkastinum, uml. 30 x 120m á kortinum, verður gjørt til eitt D-øki.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var samtykt við 6 atkvøðum, Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu fyri.
Kaj Eli Hansen atkvøddi ímóti tilmælinum frá Teknisku nevnd.